# Ross eru ein partur av lívinum

**Nina Brockie hevur altíð dámt væl ross og at undirvísa við rossum, og um knappar tveir mánaðir verður hon ein av fyrstu føroyingunum, sum hava tikið útbúgving sum ríðilærari**

RÍÐING

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

31 ára gamla Nina Brockie býr saman við manninum, Jens Marna Hansen, norðuri í Sundum í Kollafirði. Nina er útbúgvin lærarinna og arbeiðir á Argja skúla. Í frítíðini spælir hon m.a. sum hevari hjá besta liðnum hjá KÍF í flogbólti, og so hevur henni dámt sera væl ross heilt frá barnsbeini.

Sum 13 ára gomul byrjaði hon at arbeiða við rossum hjá Berg hestum, og líka síðani hevur hon undirvíst nógv innan ríðing. Nina er eisini, sum ein av fyrstu føroyingunum yvirhøvur, undir útbúgving hjá Dansk Islandshesteforening sum ríðilærari.

Vit hava tikið eitt prát við Ninu um hennara áhuga og tilknýti til ross.

### Tráaði eftir at ríða

Nina vaks upp hjá ommuni og abbanum í Havn, og alt tað hon kann minnast, hava ross verið í familjuni. Mammubeiggin, Robbie Brockie, hevði kappríðingarross, men tað var ikki so ofta, at Nina slapp at royna hesi, tí Robbie helt hana helst vera nakað unga.

– Eg slapp onkran hendinga túrin við rossunum, men tað var ikki ofta. Hetta, at mær dámdi so væl ross, men ikki slapp at ríða, gjørdi eisini, at eg tráaði eftir at sleppa at ríða, sigur Nina Brockie.

Hon sigur seg annars minnast væl fyrsta rættiliga túrin, sum hon var á rossabaki.

– Ja, tað minnist eg væl. Tað var á einum av rossunum hjá Hans Paula Poulsen. Sjálvt um eg var lítil, so lovaði hann mær altíð at ríða á sínum rossum, og hetta dámdi mær ómetaliga væl, minnist Nina.

### Byrjaði hjá Berg hestum

Sum Nina vaks, gjørdist áhugin fyri rossum ikki minni. Fekk hon møguleika at fara á rossabak ella bara hava okkurt við ross at gera, so tók hon gleðiliga av, og tá hon var 13 ára gomul, fekk hon sína fyrstu ryssu frá einum manni í grannalagnum.

Onkur man helst hava lagt merki til stóra áhugan hjá Ninu fyri rossum, tí ein dagin ringdi Leif Berg til hana og spurdi, um hon ikki hevði áhuga at koma at arbeiða hjá Berg hestum, og Nina var skjót at taka av.

– Nú fekk eg møguleika at arbeiða við rossum, og tað var jú hetta, mær dámdi. Harafturat treivst ryssan hjá mær ikki so væl einsamøll, og tí lá væl fyri at taka hana við til Berg hestar, har hon í nógv ár bleiv nýtt til túrar við rørslutarnaðum og fólki við øðrum brekum.

Síðani henda dag hevur Nina hjálpt til hjá Berg hestum. Hon var m.a. við til at byrja ríðiskúlan, har undirtøkan var nógv størri, enn tey høvdu væntað. Síðani tá hevur ríðiskúlin verið eitt afturvendandi tiltak, og til komandi ríðiskúla, sum byrjar í september, standa fleiri fólk longu nú á bíðilista.

### Leiðin gekk til Íslands

Nina hevur tó ikki alla tíðina verið knýtt at arbeiðinum hjá Berg hestum. Hon hevði leingi havt ein dreym um at fara til Íslands at arbeiða við rossum, og einaferð eydnaðist hetta hjá henni.

– Eg søkti í fleiri umførum at sleppa at arbeiða við rossum í Íslandi, men tað var ikki lætt at fáa arbeiði, kanska serliga tí at eg var genta. Eg valdi tí at fara á FHS, men tá eg var byrjað í skúlanum, fekk eg brádliga játtandi svar frá einum úr Íslandi, sigur Nina Brockie, sum ikki ordiliga visti, hvat hon nú skuldi gera.

Hon gjørdi tó av at gera skúlan lidnan, og so royndi hon aftur at biðja um arbeiði eftir lokna skúlagongd, og ikki gekk long tíð, til hon enn einaferð fekk játtandi svar úr Íslandi.

So gekk leiðin til Íslands, har hon tilsamans hevur verið í tvey ár í ymiskum støðum. M.a. hevur hon verið á einum ítróttarskúla við serligum atliti til ross.

### Brennur fyri hesum

Sum vit skilja á Ninu, so er arbeiði við rossum nakað, sum hon veruliga brennur fyri. Hon hevur havt tilknýti til ross alt sítt lív, og tað er als ikki nakað, sum hon ætlar at gevast við.

– Nei, mær dámar hetta ótrúliga væl, og tí ætli eg mær als ikki at gevast. Eg ætli mær at arbeiða víðari við rossum, so leingi eg kann.

Nina er eisini sum ein av fyrstu føroyingunum nakrantíð undir útbúgving sum ríðilærari hjá dansk islandshesteforening. Um alt gongur eftir ætlan, so verður hon liðug við hesa útbúgving síðst í august mánaði.

Hon sigur at enda, at útbúgvingin sum ríðilærari tó neyvan verður tann seinasta.

– Mær dámar so væl at arbeiða við hestum, og tí havi eg ætlanir um at útbúgva meg víðari innan hetta einaferð seinni, sigur Nina at enda við einum smíli.



Mynd: Sunva Ey. Lassen

*Um stutta tíð kann Nina Brockie kalla seg ríðilærara*